## Alt treytað av gávum

Alt arbeiðið í Heimamissiónini verður borið uppi í forbøn og við fíggjarligum stuðli og sjálvbodnum gávum. Gevaratænastan hevur avgerandi týdning fyri at ein kann hava eitt virkið missiónsarbeiði, bæði lokalt, í landsarbeiði og millum onnur fólkasløg. Gávurnar kunnu býtast upp í fimm høvuðspartar: Fastir gevarar, gávuinnsavnan, aðrar inntøkur, innsavnan í kirkjum og missiónshúsum og inntøkum av fyritøkum hjá Heimamissiónini.

## Skal vera innbjóðandi

Fyrrapartin leygardagin vóru umleið fleiri fólk savnaði í Meinigheitshúsinum, har tey viðgjørdu evnið "Hvat er ein savnandi meinigheit?". Sverri Steinhólm, prestur, legði fyri og nam við fleiri ymiskar møguleikar. Eitt var at gera tað áhugavert at koma í meinigheitina, gera tað 'innbjóðandi'. Hann tosaði eisini um at geva fólkum ábyrgd. - Vit eiga at geva fólkum ábyrgd, nokk so skjótt eftir at tey eru komin í meinigheitina. Tað kann vera á so mongum ymiskum økjum, segði hann sambært mission.fo.



# heilt vikuskifti

í høllini klokkan har Bergur D. Joensen, talaði um evnið "Tey hildu saman".

### Til øll fólk

Sum longu nevnt eru ársmøtini eisini eitt høvi at tosa saman um arbeiðið heima og úti. Hetta varð ein stórur partur av leygardegnum brúktur til, bæði við áhugatímum og við beinleiðis orðaskifti millum fólkið.

Seinnapartin greiddi formaðurin í Heimamissiónini, Thomas Dam frá um virksemið farna árið, samstundis sum Jørmund Foldbo, fíggjarleiðari greiddi frá fíggjarstøðuni (sí aðra grein á síðuni). Høvið varð her hjá fólki at koma við heilsanum og at seta spurningar til tað, sum var komið fram í frágreiðingunum.

Tey stóru møtini á ársmøtunum vóru send beinleiðis umvegis sendinetið hjá Lindini. Og leygarkvøldið varð stórmøtið somuleiðis tikið upp til eina andaliga sending, sum í næstum verður send í sjónvarpinum seinnapart ein sunnudag.

Við hetta møtið talaði aðalskrivarin Øssur Kjølbro um evnið "Saman um Kristus". Ungdómskórið Vox sang við hetta høvið, og tað gjørdu tey aftur seinni um kvøldið, tá eitt lovsangskvøld við vitniløtu var á skránni.

Ársmøtið endaði í gjár við einum felags sunnudagsskúla í Ítróttarhøllini og juniormøti í Meinigheitshúsinum, og við einum møti seinnapartin, har Heri Kjærbo talaði um evnið "Saman um tænastuna". Streingjakórið í KFUM&K í Klaksvík sang við hetta høvið.

Síðani fóru Heimamissiónsvinirnir glaðir aftur til hvør sítt stað, eftir at hava verið saman eitt heilt vikuskifti saman við trúgvandi fólki úr øllum landinum!



*Eftir at Vagn Foldbo fór úr starvi sum aðalskrivari í Heimamissiónini í fjør, tók Øssur Kjølbro úr Klaksvík við hesum starvi. Her talar hann við eitt sjónvarpsmøti, sum eisini varð tulkað fyri teimum deyvu*




*Fríggjakvøldið talaði Bergur D. Joensen, prestur í Havn*



*Eitt av góðu kórunum í Heimamissiónini er ungdómskórið Vox, sum sang leygarkvøldið undir leiðslu av Ásbjørn Berthelsen*

## Hall uppá 465.000 krónur

**Fleiri orsøkir eru til, at Heimamissiónin hevði hall í roknskapinum í fjør. Høvuðsorsøkin er, at gávurnar eru minkaður við umleið 300.000 krónum, men ein øking í øðrum útreiðslum gera seg eisini galdandi. - Ongin orsøk er kortini at óttast, slær formaðurin í Heimamissiónini, Thomas Dam fast**

FÍGGJARMÁL
*Snorri Brend*

Seinnapartin leygardagin legði fíggjarleiðarin Jørmund Foldbo fram roknskapin hjá Heimamissiónini.

Heimamissiónin er virkin á mongum økjum, og hava fleiri av hesum arbeiðsgreinum sín egna roknskap, sum verður taldur saman við restini.

Hóast tað ikki er eitt mál í sjálvum sær, so hevur Heimamissiónin onkur ár havt yvirskot. Men í fjør var talan kortini um eitt undirskot, sum var munandi verri enn ætlað.

– Vit vistu, at eftirlønirnar til starvsfólkini, sum vóru innførdar í 2008, fóru at hava stóran eykakostnað við sær. Tí hava vit arbeitt við at økja gevaratænastuna fyri at útvega inntøkurnar til hetta. Her er langt frá komið á mál, staðfesti fíggjarleiðarin hjá Heimamissiónini.

### Færri gávur

Í 2007 valdi Heimamissiónin at gjalda alt lánið í Leguhúsinum í Nesvík aftur. Harvið vóru 450.000 krónur spardar í avdráttum.

Ætlanin var at seta tilsvarandi upphædd av til eina komandi útbygging, men varð avgjørt at bíða við hesum til í ár. Tískil vóru útlit til eitt rímiligt úrslit í 2008.

Tey vóru haraftrat greið um, at tey komu at nýta um 100.000 krónur til forarbeiðið í sambandi við ætlaða missiónsarbeiðið í Kambodja. Samstundis varð eitt gevaraátak sett í verk við at vitja hvørt einstakt stýri fyri missiónshúsini kring landið.

- Samlaði kostnaðurin av hesum átaki var um 100.000 íroknað løn, ferðing og kunningartilfar. Sostatt væntaðu vit eitt hall á 200.000 krónur, sigur Jørmund.

Hann kundi kortini staðfesta, at bæði mánaðargávurnar, ársgávan og gávur annars vóru fallandi, íalt okkurt um 300.000 krónur minni enn árið fyri.

Samstundis var sølan av vørum og tænastum lægri, og gjørdi hetta sítt til, at úrslitið varð 150.000 krónur verri enn mett.

- Við nøkrum sparingum er endaliga úrslitið altso eitt hall upp á 465.000 krónur, sigur Jørmund Foldbo.

### Eingin vandi

Thomas Dam, formaður í Heimamissiónini, vísti á, at Heimamissiónin ikki hevur sum endamál at hava eitt yvirskot.

Hinvegin ber ikki til at koyra við undirskoti yvir longri tíð.

– Tað er ikki nakar vandi á ferð, tí Heimamissiónin er væl konsoliderað, hevur onga skuld og eigur pengar á bók. Vit mugu tó miða eftir at fáa javnvág í roknskapin sum skjótast, sigur Thomas Dam.